# DEJA VU KOMU AFTUR

**Deja Vu verður eisini millum bólkarnar, sum fær møguleika at vísa fyri føroyskum og útlendskum áhoyrarum alt tað teir duga. Og tann 23. apríl kemur fløgan hjá DejaVu út. Hetta er sama dag, sum Atlantic Music Event er í Norðurlandahúsinum**

AME 2005
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Deja Vu vunnu sær ikki sess í semifinaluni, og gjørdi hetta kanska ein part av lurtarum og/ella fjepparum bilsin. Men sum navnið so rámandi ber boð um, so koma teir nú sterkt aftur í aftur.

Limirnir sleppa at vísa á palli fyri føroyingum og útlendingum, hvat teir hava at bjóða. Og so leggja teir eisini sama dag, tann 23. apríl, nýggju fløgu sína fram. Ein fløga, sum er millum tær dýraru í føroyskari fløgusøgu, hvat framleiðslu viðvíkur.

Deja Vu spælir flottan tónleik. Tónleik, sum í støðum kanska kann sigast at hava symfonisk drøg. Í øllum førum skal ein næstan seta seg væl tilrættis og hava alt hjá sær, ið ein heldur seg hava brúk fyri, innan ein setir seg at lurta. Tónleikurin er ofta stillur, tykist venda inneftir, skapar hugalig hugløg, vakurt, stilt, kanska mediterandi, um ein er til slíkt.

Og um lesarin ikki heilt er samdur í hesi - kanska fátæksligu - lýsing av tónleikinum, so er óivað breið semja um, at tað í øllum førum er ringt at vakna og gera morgunfimleik aftur við Deja Vu. Og tað hevur sjálvandi heldur ongantíð verið meiningin.

Her er heldur talan um flottan og vælspældan tónleik. Og Deja Vu hevur tíbetur verið í upptøkuhølunum og eisini fingið kønar hendur at hjálpa sær tøkniliga.

## Fløgan

Tann 23. apríl kemur fløgan hjá DejaVu út. Deja Vu eru í Norðurlandahúsinum við einum sølubási, umframt at fara á pall. Fløgan er ein sera stór, flott og dýr ætlan, sum hevur verið longi ávegis.

-13 løg eru á fløguni og ein bóklingur er við, ið telur heilar 156 síður. Í bóklinginum eru m.a myndirnar, sum limirnir í Deja Vu eisini hava havt á framsýning. Alt, t.v.s. tekstir, myndir og tónleikur, er býtt í kapitlar, so talan er um eina heildarupplivingg, sigur Flóvin E. Viderø úr Deja Vu.

Og tað sum hevur verið at hoyra av fløguni ber boð um, at hetta av sonnum er eitt verk, sum er vert at leggja oyru til, tí góðskan á spæli og ljóði er sera høg. Deja Vu hava gjørt sær ómak og eisini brúkt nógvan pening, nakað meira enn 300.000 krónur.

Niclas Johannesen og Jón McBirnie hava framleitt og Óli Poulsen hevur blandað ljóð og hesi nøvn borga eisini fyri góðsku. Og góðska er tað eftir øllum at døma, sum Deja Vu leggur fram tann 23. apríl.



# TRUMMUSPÆLARIN SUM GEKK EGNAR VEGIR

**Høgni Lisberg hevur seinastu tvey árini roynt seg á egnum veingjum, og hann er um at verða klárur við sínari næstu fløgu**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg kom fram í føroyskum tónleiki sum trummuspælari í bólkinum Clickhaze, sum í nøkur ár var nakað av tí besta og mest spennandi, sum føroyskur tónleikur kundi bjóða.

Men eftir at bólkurin gavst at spæla, hevur Høgni Lisberg roynt seg sólist. Hann skrivar, spælir og syngur sínar egnu sangir, og tað hevur longu ført hann út í heim at spæla og taka upp.

Fyrsta útgávan hjá honum kom í november mánaði 2003, og tann næsta er á veg.

Høgni Lisberg hevur verið í Lundgaard Studio í Danmark og tikið upp, og fløgan hjá honum verður ljóðblandað av Luc Van Acker í Belgia. Hetta arbeiðið er um at verða liðugt nú, og um stutta tíð verður nýggja fløgan hjá Høgna tí at fáa.

Jens L. Thomsen er aftur hesaferð nærmasti samstarvsfelagin hjá Høgna Lisberg, men afturat teimum eru eisini aðrir føroyskir tónleikarar við á útgávuni – millum annað Hans Poulsen, Allan Tausen og Jana Hjalgrímsdóttir.

## Spælir burturi og heima

Síðani fyrsta útgávan hjá Høgna Lisberg kom á gøturnar, hevur hann spælt til nógvar konsertir í Føroyum og uttanlands.

Hann hevur millum annað verið á konsertferð í Sveis, sum eydnaðist sera væl, og sum gav honum góðar kontaktir í tónleikalívinum har.

Nógvar internetsíður og tíðarrit hava eisini ummælt fløguna hjá Høgna Lisberg, og hann hevur fingið nógv góð orð fyri sín tónleik. Seinasta ummælið stóð at lesa í blaðnum Loop.

– Røddin hjá Høgna Lisberg gevur tær eina heita kenslu av tryggleika. Tónleikurin hjá honum er stundum so vakur, at tú sært ein mynd fyri tær av eini livandi og blómandi ong við seyðafylgi, skrivar ummælarin hjá Loop.

Og hesar myndir kunnu hoyrast í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið.

